Mekaniskur verkstaður
Umvæling og umbygging av skipum og bátum.
Umvæling og útskifting av motorum, gearum, og øllum mekaniskum lutum.
Alt vanligt smiðju og plátuarbeiði úr stáli og aluminium.
Umvæling og reinsing av turboløðarum.
Seramboð til slíping av ventilum og ventilsetrum.

Skips-og bátamotorar
Umboð: Mitsubishi, Grenaa, M.A.N., Rolls Royce-Bergen, Bukh

Generatoranlegg
Mitsubishi 20 - 1500 Kw.
M.A.N. 80 - 596 Kw.

CJC Filtur
Einaumboð uppá CJC filtur í Føroyum.
Kunnu nýtast til dieselolju, smyrjiolju, gearolju, hydraulikkolju og transformatorolju.

Mobilkranar
Tveir mobilkranar.
Kunnu lyfta upp til ávikavist 45 og 80 tons.

MEKANIK
p/f OLIVAR RASMUSSEN
Fjøruvegur Postboks 72 FO-620 Runavík
Tlf.: +298 447425 Fax.:+298 448021 E-mail: mekanik@post.olivant.fo

POWER AT SEA

Reliable Power at Sea is Essential

ALMA has developed a strong position as a sales and service company, offering a wide range of top-quality products, such as Caterpillar and MaK Marine Engines, Gensets etc.
ALMA supplies the Faroese market with different kinds of spare-parts for a wide variety of other brands.

As communications between the Faroe Islands and rest of the world are good, ALMA is able to work closely with its suppliers in ensuring that spares and equipment are delivered at short notice.

The company offers a 24-hours a day service throughout the year.

P/F ALMA
Maskinverkstaður & Smiðja

CAT
MaK

Á Hjalla 15, FO-110 Tórshavn • Faroe Islands Tel +298 31 58 90 • Fax +298 31 35 00
www.alma.fo • alma@alma.fo

petur & petur • +298 320870

p/f Esmar Simonsen
SKF - Umboð
Legur og Reimar
Gates
Trukkar:
Still
Caterpillar
Daewoo
Pakkiútgerð:
Maskinur,
folie og band
Lyftivognar og
viðfestisvognar
Akkumulatorar
Til øll endamál!
p/f Esmar Simonsen

Vit hava stórt úrval av reiðskapi til línuveiðu

Vit framleiða:
Flótilínu • Spunpolyesterlínu
Terylene/Danlinelínu • Reina Terylenelínu
Hvítar teymar nr. 4-20 • Svartar teymar nr. 4-20

Línurnar fáast úr 3,5 til 9 mm. Longd millum svøvlarnar eftir ynski.

Teymarnir fáast rippaðir ella rippaðir við húkum í ymiskum støddum.

Vit hava eisini klæðir til fiski- og arbeiðsfólk frá innast til uttast.

...vælkomin inn á gólvið

SNØRISVIRKIÐ í Klaksvík
TEYMAVIRKIÐ í Runavík



# Fiskimenn glaðir fyri SkipsSosialin

**–SkipsSosialurin er væl móttikin umborð, og hetta er ein kærkomin møguleiki hjá okkum sum sigla at fylgja við tí, sum hendir har heima, siga Regin og Rúni í Hjøllum.**

FJØLMIÐLAR
*Vilmund Jacobsen*



*SkipsSosialurin er væl móttikin umborð á Akrabergi.*
*–Hetta er ein kærkomin møguleiki hjá okkum sum sigla, at fylgja við tí, sum hendir har heima*

Tvíburðarnir, Regin og Rúni í Hjøllum, sum hava verið meira enn 30 túrar við verksmiðjutrolaranum, Akrabergi, siga, at fiskimenn eru sera fegnir um SkipsSosialin.

–Skiparin ella stýrimaðurin taka SkipsSosialin niður av netinum hvønn dag, leggja hann á eina diskettu og printa tað út, sum hildið verður at hava áhuga. Tvey eintøk í A4 stødd verða so løgd niður í messuna til manningina at lesa. Tann partin, sum ikki verður printaður út, kann manningin sjálv lesa á telduni í radiorúminum.

Regin og Rúni siga, at tvær teldur eru umborð, harav onnur er til internetið, og har sita menn javnan og lesa SkipsSosialin.

–Jú, SkipsSosialurin er væl móttikin umborð, og hetta er ein kærkomin møguleiki hjá okkum sum sigla at fylgja við tí, sum hendir har heima.

Spurdir, um teir fáa onnur føroysk bløð at lesa á sama hátt sum SkipsSosialin, siga teir, at tað fáa teir ikki.

## Útvarpið hoyrist

Teir báðir siga annars, at Útvarp Føroya hoyrist rímiliga væl í Irmingarhavinum og partvís í grønlendskum sjógvi.

–Í norskum sjógvi eystanfyri hoyrist Útvarpið eisini, men tá ið vit koma í russiskan sjógv, hoyrist illa og slett ikki, tá ið vit koma longur eystur.

Umborð á Akrabergi eru hátalarar á brúnni, messuni, skiftirúminum, kømrunum, verksmiðjuni og á dekkinum.

–So, vit hoyra Útvarpið næstan allastaðni umborð. Á verksmiðjuni og á dekkinum er oftast so nógv óljóð, at illa ber til at lurta, siga Regin og Rúni í Hjøllum.

Fótbóltur 2002
- serútgáva í litum frá Sosialinum

Aftur í ár gera vit eitt fótbóltsblað, har vit royna at leiða lesaran eitt sindur meira afturum leiktjøldini enn vanligt. Tosað verður við leikarar, venjarar og leiðarar, sum hvør í sínum lagi hava givið til kennar sínar hugsanir og ynski.

Fyritøkur og onnur, ið ynskja at lýsa í hesari serútgávu, eru vælkomin at venda sær til okkara fyri at fáa nærri upplýsingar.

Ringið til Sosialin 311820, og tosið við:
Anju Weihe
Marknaðardeildin
anja@sosialurin.fo